# Aftur tap til Hødd

Hødd tók ímóti NIL-Trysil á Høddvoll Leikvøllinum í Ulsteinsvik. Tað var minni enn hálvur tími farin, tá NIL-Trysil hevði lagt seg á odda 3-0 við tveimum málum hjá Håvard Storbæk, og einum máli hjá Kim Ojo. 3-0 gjørdist eisini hálvleiksstøðan. Hødd royndi at gera ein spurt ímóti endanum av dystinum, Eirik Hoseth og Fernando Caballero minkaðu um munin til 2-3, men longur rakk Hødd ikki. Hødd er framvegis undir niðurflytingarstrikuni í næstbestu norsku fótbóltsdeildini við 9 stigum fyri 12 dystir.

# Blé heldur fram á Argjum

Um AB næsta kappingarár framvegis fer at spæla í 1. deild, ella um AB fer at flyta upp aftur í bestu deildina, er framvegis ógreitt. Men longu nú er tað greitt, at Evradr Blé eisini næsta kappingarár fer at spæla við AB. AB heimasíðan veit at siga, at AB og miðvallarin, sum eisini er liðformaður, í leygarkvøldið skrivaðu undir sáttmála, sum bindur spælaran og felagið at hvørjum øðrum til næsta kappingarár verður liðugt. Galdandi sáttmálaskeiðið var annars runnið nú í summar.



*Meistararnir vóru enn eina ferð mintir á, at grannarnir hinumegin Eiðið eru ikki at spæla við*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

NSÍ-Víkingur 1-3 (1-0):

# Viljin var sum stál hjá víkingum

**At fótbóltur er liðavrik, sum - umframt á bóltførleika og fatan fyri spælinum - eisini er grundað á stríðsvilja, orku, ferð og styrki varð ruddu-liga undirstrikað, tá ið Víkingur setti meistar-arnar upp á pláss**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

*NSÍ*

*Víkingur*

Fótbóltur er liðspæl. Tað er gott at hava eyðsýndar einstaklingar. Teir kunnu ofta gera munin á, hvør endar omaná, og hvør endar undir. Men sum oftast er avgerandi, hvussu eindin riggar. Eitt gott dømi um hetta var fríggjakvøldið, tá ið Víkingur rudduliga streyk avstað við øllum stigunum, tá ið gøtumenn og leirvíkingar vitjaðu grannarnar við Løkin.

Víkingur vísti størsta partin av tíðini besta liðavrikið. Hugburðurin var framúr. Nærlagni og styrkin í nærdystunum vóru stór, og sum 2. hálvleikur leið, lýsti viljin at vinna nógv meiri út av teimum ljósa bláu, sum høvdu meiri ferð og vóru nógv meiri avgjørdir.

NSÍ legði seg á odda beinanvegin. Víkingur gjørdi óneyðugt fríspark í vinstru ímóti Einari Hansen, Hjalgrím Elttør sendi innfyri, og Øssur Dalbúð var aftur hesa ferð á rætta staðnum í røttu løtuni, tá ið hann við høvdinum stýrdi bóltin í málið.

Eftir málið leikaði javnt á í eina løtu, men so við og við sást, hvønn veg tað bar. Gestirnir vóru grammari og arbeiðssamari, og heimamenninir høvdu alt meiri ilt við at finna saman og at vinna týdningarmiklu nærdystirnar og returbóltarnar.

Sølvi Vatnhamar og Sam Jacobsen vóru óførir á sentrala miðvøllinum, og umframt dygdirnar í liðavrikinum, so hevði Víkingur mest eyðsýnda mannin á vøllinum:

Andrias Lava Olsen var støðug hóttan fyri heimaverjuna og eisini miðvøllin, tá ið hann fór aftur á vøllin fyri at fáa fatur á bóltinum. Tað gekk ógvuliga illa at fáa bóltin av honum, og ikki minst hansara einmansavrik var orsøkin til, at Víkingur fekk valuta burtur úr yvirvágini, sum gjørdist alt størri.

Men tað tók sína tíð. Tórður Thomsen helt NSÍ málið reint, inntil minni enn eitt korter var eftir. So skrædnaði, og tað var væntandi. Erling Jacobsen, sum var ytstur á miðvøllinum í vinstru, gjørdist alt meiri eyðsýndur og vísti ferð og tyngd í gjøgnumbrotunum, og fleiri vandastøður spurdust burturúr innleggunum.

Útjavnandi málið stóðst av verjumistaki. Tórður Thomsen var ov seinur eftir kiksaðari afturlegging, Andrias Lava Olsen var sum eitt fok har og fór um koll, og dómarin peikaði á brotssparksblettin. Liðformaðurin, Niclas Niclasen, var púra kaldur og tryggur, og tað kendist, at tað var meiri eftir í posanum hjá Víkingi.

Erling Jacobsen skoraði til 1-2. Eftir bólttap var Zoltán Bukzegi enn eina ferð fyrri á enn mótstøðumenninir, hann smekkaði til eitt sindur úr høgru, málverjin hálvbjargaði, og sum í flestu øðrum støðum, so var ein víkingur fyrstur á returbóltinum.

So fekk NSÍ skund. Skiftingarmøguleikarnar høvdu teir brúkt. Einasti málskjúttin, Øssur Dalbúð, slapp ikki á vøllin eftir steðgin, og miðskeiðis í 2. hálvleiki vóru tvær skiftingar gjørdar í roynd at tippa.

At nógv fólk varð flutt fram á vøllin síðstu løtuna bar fleiri vandamiklar støður við sær frammanfyri NSÍ málið enn í hinum endanum. Karoly Potemkin hevði sum rímuligt var torført við at samskifta við liðfelagarnar. Ofta var hann úti í borðunum, og so var eingin gulur í mótstøðubrotsteiginum.

Aco Panudorvic sá reytt fyri professionelt fríspark, og so var tað, at liðavrikið og dygdirnar hjá mest eyðsýnda einstaklinginum gingu upp í hægri eind: í snarálopi spældi Erling Jacobsen, sum var staddur mitt fyri, eitt sindur í høgru og framum tunnu verjuna, og Andrias Lava Olsen smekkaði bóltin í málið.

Meistararnir vóru enn eina ferð mintir á, at grannarnir hinumegin Eiðið eru ikki at spæla við. Teir vístu bestu liðdygdirnar, og teir áttu besta einstaklingin.

Nú er Víkingur á triðja plássi, og um teir halda fram við somu ferð, so kunnu teir røkka uppaftur hægri. Spurningurin er, um teir nú fara at megna at halda tørn um dygdirnar, sum eru tær, ið avgera tættar fótbóltsdystir.

## Soleiðis skal tað vera

Tað eru tveir av royndu og sigursvandu GÍ spælarunum, sum sita á beinkinum hjá Víkingi. Anton Skoradal er venjari og Magni Jarnskor er hjálparvenjari. Teir hava báðir vunnið nógv, og eitt av eyðkennunum hjá GÍ liðnum í teirra tíð var stríðsvilji og fínur hugburður.

- Okkara vísa framúr hugburð, og teir fáa løn fyri tað. Nú ræður um at halda tørn um sovorðin avrik, so fæst at síggja, hvat kann spyrjast burturúr, helt væl nøgdi Magni Jarnskor.

Víkingur hevur tap ímóti ÍF og B68 og spælt javnt ímóti Skála og KÍ. Seinastu ferðirnar hevur tað eydnast at vinna á oddaliðunum báðum EB/Streymi og NSÍ:

- Hetta vísir, at vit hava møguleika ímóti øllum, og at vit kunnu tapa ímóti øllum. Tað ræður fyrst og fremst um hugburðin, og tað er neyðugt, at hann verður tann rætti, tá ið Skála sunnudagin kemur at vitja, heldur væl nøgdi Magni Jarnskor.

## Sigursrøðin steðgað

Í NSÍ leguni var lagið einki serligt eftir tapið. Semja var um, at hetta hevði verið eitt tað lakasta ella rættari tað lakasta avrikið av øllum higartil í hesum árinum.

NSÍ hevði undan fríggjakvøldið spælt seks ferðir uttan at tapa. Fýra sigrar og tveir javnleikir hevur úrslitið verið.

Jónas Þór Næs sást einki til fríggjakvøldið. Hann verður við hóskvøldið, tá ið HB kemur at vitja. Hugburðurin hjá honum er altíð framúr, og tí verður hann kærkomin. Um Karoly Potemkin verður millum teir fyrstu ellivu fer tíðin at vísa. Avrikið fríggjakvøldið bar ikki boð um, at hann eigur sjálvskrivað pláss.